# Ferðafrásøgn frá Harmoniku-felag Føroya

Harmonikufelag Føroya var í juli 2005 boðið til Landsmót í Íslandi. Tað eru harmonikufeløg í Íslandi, sum fyrireika stevnu fyri hamonikutónleikarum úr Íslandi og øðrum londum í Europa.

Stevnan er eitt vikuskifti og varar í tríggjar dagar. Tónlistarliga støðið er ymiskt, heilt frá 20 ára gamla Søren Brix, sum er danmarksmeistari í harmonikuspæli og til okkum føringar, sum eisini framførdu á stevnuni og komu væl frá okkara framførslu.

Við góðari hjálp og fíggjarligum stuðli frá okkara sponsorum, sum vit hervið vilja nýta høvi at takka hjartaliga fyri , fóru vit við "Norrønu" 7 juli 2005. Vit høvdu buss við til Seydisfjarðar, har vit vóru sera væl móttiknir av okkara vertum við føroyavininum Egili á odda. Hann er leiðari á tónleikarskúlanum á Neskaupstaðir, ein býur við uml. 1700 íbúgvum. Tónleikaraskúlin er eisini fyri grannabýirnar. Vit búðu í skúlanum,sum hevði allar hentleikar. Haraftrat vóru vit bodnir heim til búgvið borð bæði privat og av feløgum í Neskaupstaðir.

Við bussinum varð koyrt til tey mest áhugaverdu støðini á Norður- og Eysturlandinum, og hetta vóru minniligir túrar ikki minst, tí at veðrið var so avbera vakurt, meðan vit vóru har, heiður himin hvønn dag. Vit hava knýtt vina- og tónlistabond við grannar okkara vesturi í hav. Eitt samstarv er við at menna seg longu nú til gagn fyri báðar partar.

Vert er at nevna, hvussu nógv meira harmonikutónleikur er frammi í Íslandi, harmonikan verður eisini nýtt til klassiskan tónleik, og til ber at fáa frálæru á tónleika konservatorium, ið verður nevnt accordion tónlist.

Nevnast kann, at frásøgumaðurin á landsmótinum var prestur í Neskaupstaðir, og hann var ein sera hugnaligur og skemtiligur frásøgumaður, sum var ótømandi fyri smáar sera stuttligar søgur, serliga nógvar vóru um prestar, ella sum hann altíð vísti á, so var tað gamla prestin, talan var um.

Vit vóru heima aftur í Føroyum 14. juli í øllum góðum, eftir ein ógloymandi túr hjá frændum okkara í Íslandi.

*Vegna Harmonikufelag Føroya*
**Nevndin**


# Teknikapping í Sosialinum



Teknikappingin í Sosialinum er byrjað. Kapping er skipað soleiðis at hvønn dag til jóla, verður ein mynd av Jólamanninum Kjøtkróki í Sosialinum. Børnini skulu gera eina tekning, sum líkist so nógv sum gjørligt. Niðast á síðini er ein lepi, sum tit skulu klipsa saman við tekningini. Minnist til at tað skal verða ein lepi fyri hvørja tekning.

Tekninganir skulu verða okkum í hendi 27 desember. Tí tá kemur Kjøtkrókur oman í Miðlahúsið at finna vinnarin. Vinningurin er eitt gávukort á 1000 kr. frá einari av hesum fyritøkum:

**Hjá Gunleivi · Føroya Banki · Statoil · BR-Leikur Føroya Lívstrygging · Føroya Bjór · SMS · Tryggingarfelagið Føroyar · Kall · Balslev · Føroya Tele · Skemman · MBM · Daddan · FK · Rio Bravo · Nantong · Pizza 67 · Farodane City · Vøruhúsið á Hjalla · Føroya Sparikassi · Atlantic Airways · Bowling · Merlot · TelduTænastan · A.H.Jensen · Hjá Eli · Smúkkuhjørnið · Postverk Føroya · Glas & List · Atlanticpane**

Navn: ______________________

Adressa: ______________________

**Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Teknikapping"**


# Landsins bíligasta bilfígging

**Tryggingarfelagið lækkar rentuna á fígging av bæði nýggjum og brúktum bilum. Rentan á lánum til nýggjar bilar verður nú 4,25 prosent**

BILFÍGGING

- Skalt tú keypa bil, so bjóðar Tryggingarfelagið Føroyar tær ta skjótastu og bíligastu fíggingina á marknaðinum. Tú fert beina leið inn á bilasøluna, og har fært tú lagaliga fígging og trygging alt fyri eitt. Uttan hóvasták.

Hetta sigur Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar í tíðindaskrivi.

Tryggingarfelagið siugr, at tey hava við sera góðum úrsliti bjóðað bilakeyparum fígging á staðnum. Rentan var kappingarfør, men síðan í summar er rentustøðið nógv broytt. Tí hevur Tryggingarfelagið Føroyar gjørt av at lækka rentuna á bilfíggingini av bæði nýggjum og brúktum bilum. Og tað er ikki smávegis lækking!

Rentan til fígging av nýggjum bilum, sum hevur verið 6 prosent, lækkar niður í 4,25 prosent.

- Tað er nógv tann lægsta rentan á marknaðinum. Til samanberingar er almenna rentan hjá teimum størstu peningastovnunum 1 og 1,35 prosent hægri, sigur Tryggingarfelagið.

Tryggingarfelagið Føroyar hevur eisini gjørt av at gera fíggingina av brúktum bilum enn lagaligari. Rentan á lánum til brúktar bilar er frá dags degi lækkað úr 6 prosentum niður á 5,75 prosent.

Samstundis lækkar Tryggingafelagið Føroyar kravið til útgjald og gevur møguleika fyri eini longri afturgjaldingartíð, so tað gerst nógv lættari at ogna sær ein brúktan bil.

- Tilsamans hevur Tryggingafelagið í dag tað besta tilboðið til bilfígging á marknaðinum. Í viðheftu talvuni niðanfyri síggjast rentusatsir, útgjald og afturgjaldingartíðir, sigur Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagum Føroyar.

Talva, sum vísir kravið til útgjald í % av keypsprísinum og afturgjaldstíð í mánaðum

| Árgangur | útgjald í % | afturgj. Tíð í mðr. |
|---|---|---|
| 2005 | 25 | 72 |
| 2004 | 25 | 60 |
| 2002 | 30 | 48 |
| 2000 | 35 | 36 |
| 1998 | 40 | 24 |
| | | |
| 2005 | 30 | 84 |
| 2003 | 30 | 48 |
| 2001 | 30 | 48 |
| 1999 | 35 | 36 |
| 1997 | 40 | 24 |






forkunnuga jólagávan!

LISTIR

Gríms Kambansgøta 17, 100 Tórshavn,
telefon 310081, teldupostur: mentir@post.olivant.fo

KØKUR Í SERKLASSA FRÁ INVITA - det personlige køkken



30% í avsláttri uppá COMET í desember

Sandavágs Timburhandil · á Hillingatanga 6
Fo 360 Sandavágur · tel 332700 · fax 332701 · invita@post.olivant.fo